## Pól Skarðenni í Smiðuni í Lítluvík

Í morgin fríggjadagin letur Pól Skarðenni upp málningaframsíning í Smiðuni í Lítluvík. Myndaevnið er tað føroyska landslagið, bygdir, bátar og býir. Tær flestu myndirnar eru málaðar uti á staðnum. Tær stórstu tó á vekstaði. Tøknin er olja á lørift, mála við knívi. Opið verður soleiðis: Fríggjadagin 12. oktober kl. 15 – 18, leygadagin 13. oktober kl. 11 – 14, sunnudagin 14. oktober kl. 15 – 18, mánadagin 15. oktober kl. 15 – 18, týsdagin 16 oktober kl. 15 – 18.



## Pensjónistar í Íslandi

Ein ferðabólkur frá Pensionistafelag Føroya er komin til Íslands at vitja. Í hesum sambandi skipar Hótel Loftleiðir fyri hugnakvøldi hóskvøldið 11. oktober kl. 20.00 har øll eru hjartaliga vælkomin. – Høvi verður til at keypa sær ein kaffimunn og eisini verður barrin opin. Tey eldru úr Føroyum eru sera áhugað í at hitta føroyingar, búsettar í Íslandi, bæði yngri og eldri. Tað verða sagdar søgur frá gamlari tíð og eitt sindur av felagssangi verður tað nokk eisini pláss til. Karlakór Reykjavíkur vitjar uml. kl. 21.30. Meira fæst at vita við at venda sær til Marentzu Poulsen, tlf. 661 7305.

# Eg eri skelkaður

**- Støðan er so vánalig, at tað er bæði eyðmýkjandi og tragikomiskt fyri føroysku tjóðina. Hetta er stór skomm og kostar okkum harafturat fleiri milliardir í mistum útflutningsvirði, sigur Hóraldur Joensen á Náttúruvísindaligu deildini á Fróðskaparsetrinum**



*– Vit eru so illa stødd við útgerð og tølum, at tað er ein stór forðing fyri altjóða samstarvi. Vit noyðast at senda granskarar uttanlands, tí í Føroyum eru ikki tey mest grundleggjandi tólini at gera kanningar við og koma granskarar til Føroyar at arbeiða, er tað tann vissi deyðadómur yvir teirra karrieru, sigur Hóraldur Joensen*

GRANSKING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- Eg eri lættari skelkaður.

Ta ið Hóraldur Joensen fyri stuttum fór í starv á Náttúruvísindaligu deildini á Fróðskaparsetrinum, trúði hann ikki, at tað stóð so illa til, sum tað ger.

-Náttúruvísindaliga deildin er fólksins tøkniliga mentanarháborg, men fíggjarliga er hon so illa niðurpínd, at tað er stór skomm fyri land og fólk.

- Vit hava eitt framtíðarmál, sum vit hava nevnt Framsjón 2015. Har verður ikki bara staðfest, at vit skulu vera frammaliga. Har verður enntá staðfest, at vit skulu vera eitt av teimum fremstu londunum.

Í hesum sambandi skal dentur eisini leggjast á at menna framkomnar matvørur úr havinum.

- Men skal tað eydnast, er sjálvandi ógvuliga umráðandi, at neyðug tól til gransking og menning eru til staðar.

Sum støðan er í løtuni, so finnast fleiri av hesum tólum ikki í landinum.

Hóraldur Joensen staðfestir, at tað er ikki nóg mikið við vælútbúnum fólki.

- Á fólksins tøkniligu mentanarháborg er bara ein starvsstova, ið stórt sæð manglar øll tól, sum krevjast fyri at nærkanna tilfeingið í føroyskum havøki.

- Vit hava nøkur reagensgløs og onkur hissini onnur tól, sum allarflestu skúlar eisini hava.

Hann sigur, at her má vend koma í, tí skilið er vanlukkuligt.

Men hann sigur eisini, at støðan er eyðmýkjandi, tí tað er ein stór og týðandi forðing fyri altjóða samstarvi innan evnafrøðiliga og lívtøkniliga gransking.

- Tá ið vit søkja grunnar uttanlands um stuðul til ymsar verkætlanir, ella skulu vera við í ymsum granskingarnetverkum, verða vit aloftast spurd, hvørjar kanningar og royndir, vit sjálvi kunnu gera her heima.

- Og tá mugu vit tíverri greiða teimum frá, at vit fáa at kalla onki gjørt her heima, sigur Hóraldur Joensen.

- Hetta er beinleiðis tragikomiskt fyri eina tjóð, sum hevur sett sær sum mál at vera millum fremstu tjóðir á útvaldum økjum innan gransking og menning av vørum úr havinum.

- Sum støðan er nú, verða vit noydd at senda granskarar av landinum at granska, eitt nú, teir granskarar, sum eru í holt við Phd verkætlanir.

- Teir fáa ikki gjørt nakrar royndir her heima og tí hava vit sostatt yvirhøvur ongar møguleikar at lata teir arbeiða í Føroyum.

-Veruleikin er eisini, at koma granskarar higar at arbeiða, er tað tann vissi deyðadómur yvir teirra karrieru, tí teir fáa ikki høvi til at granska og framleiða dáta og at skriva greinar í vísindaligum tíðarritum.

## Ein dropi í Havinum

Hóraldur Joensen staðfestir, at tað ber ikki til at hava øll tól í Føroyum, men eitt minstamark má vera

- Sum eina maka byrjan, er meiningin at gera íløgur í tól, sum kunnu brúkast til gransking, undirvísing og í vinnuligum høpi til at framleiða av rádata og sostatt at fáa vitan um lipidir, proteinir, mineral og spormetal í ráværu úr havinum og til at granska í framkomnum úrdráttum.

- Allastaðni rundanum okkum verður stórur dentur lagdur á at granska í funkuføði, heilsuvarðveitandi kosti og heiliráðkosti.

- Veruleikin er, at fólk liva ósunt og tað kostar heilsiverkinum ovurhonds stórar upphæddir. Av tí sama brúka onnur lond stórar upphæddir at granska í heilsugóðum kosti, eitt nú úr havinum og her hava vit ein gyltan møguleika.

Hann sigur hevði Náttúruvísindaliga fingið útgerð fyri seks milliónir, hevði tað avgjørt verið ein byrjan.

Og nú fíggjarlógin fyri næsta ár er til viðgerðar, heitir hann staðiliga á fíggjarnevndina og á Løgtingið um at játta hesa upphæddina.

## Missa milliardir

Hóraldur Joensen ásannar eisini, at nógv fólk hava eina fatan av, at gransking er onki annað enn fjas og fjant, sum bara kostar pening.

- Hinvegin er tað onki í vegin hjá føroyingum at apa seg eftir øðrum og taka vitan til sín, sum onnur hava fingið til vega, men tað er oftast gomul vitan.

Men fyri at skera tað út í papp, hvussu stóran búskaparligan týdning, gransking hevur, nevnir hann, at bara tann livurin, vit hvørt ár tveita í havið, hevur eitt virðið upp á eina ella tvær milliardir, vissi vit gera okkum ómak at fáa fulla nyttu burtur úr lýsinum og fáa hana í kapslar.

Tað sama ger seg galdandi fyri innvøl av fiski, skræðu og slógv.

- Tað er ongin ivi um, at vit høvdu kunnað økt okkara útflutningsvirði við milliardum, høvdu vit lagt okkum eftir at granska í føði úr havinum.

- Men áðrenn vit kunnu heysta, mugu vit sáa. Brúka vit pening til gransking nú, heysta vit fruktirnar um nøkur ár, sigur Hóraldur Joensen.

Umframt at vera lektari á Náttúruvísindaligu deildini, er hann eisini leiðari fyri granskingarkjarnanum í evnafrøði og livtøkni.

Hesin kjarnin er fluttur yvir á Nàttúruvísindadeildina og synergi-effektin av, at hesir báðir stovnarnir eru undir somu lon, er tann, at grundgransking, vinnugransking og undirvísing ganga upp í eina hægri eind.

Hann hevur eisini góðar vónir um, at tað fer at eydnast fáa tey tólini, tey hava biðið um.

- Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum og í vinnumálum hava víst so mikið stóran áhuga í hesi samanrenning, at teir komu til kunnandi fund, beinanvegin heitt var á teir og tað er eisini greitt, at spurningurin um at játta okkum pening til tey ymsu tólini, verður tikið upp á landsstýrisfundi í næstum, sigur Hóraldur Joensen.